# TAÐ ER TÍÐIN

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## Tomatin virkar ímóti sjúkum

Tað er eitt gott hugskot at eta tomat – líkamikið um hon er rá ella tilgjørd onkursvegna.

Tað halda granskarar á National Centre of Food Safety & Technology í USA. Teir halda seg hava funnið fram til, at tomatir kunnu fyrbyrgja blóðtøppum, bruna og prostatakrabba.

Og teir halda seg eisini hava funnið fram til, at ein rá tomat er sunn, men at tað er minst líka sunt at eta tomatir, sum eru viðgjørdar onkursvegna – sum partur av tomatdrykkum, tomatsós ella tomatsuppu.

## Smáu handlarnir hvørva



Vit kenna alt til tað her í Føroyum. Smáu handlarnir gerast færri og færri í tali, tí stóru handlarnir taka yvir. Soleiðis er rákið eisini í Danmark. Børsen skrivar, at seinastu trý árini eru 3.330 smærri handlar stongdir. Tveir triðingar av hesum handlum vóru vestan fyri Stórabelt.

– Kappingin um kundarnar er beinhørð, og discountketurnar og vøruhúsini fara við tíðini at gera, eingir handlar verða eftir í útjaðaranum, sigur Bent Aarrebo, sum er formaður fyri felagið Handelsstandsforeningen.

Mogens Bjerre, sum er lektari á Handilsháskúlanum í Keypmannahavn, heldur, at rákið kann ikki vendast.

– Fólk leita inn til teir stóru handlarnar í býnum, og gongdin er sjálvstyrkjandi, sigur hann.

## iPad2 gevur bíligar iPad1



Síðst í mars kemur annað ættarlið av iPad hjá Apple á marknaðin her á okkara leiðum, og samstundis sum nógv gleða seg til ein betraðan og betri iPad, verða teir gomlu iPad1 bíligir at fáa hendur á. Hóast iPad1 er lutfalsliga nýggj tøkni, fer prísurin á teimum at falla munandi, nú teir nýggju iPad2 verða at fáa til keyps. Eitt er, at handlar fara at geva avsláttur, tað verða eisini nógvir privatir brúkarar, sum vilja av við sína gamla iPad, so teir kunnu keypa sær ein iPad2.



## NASA vil sleppa til Jupiter

Amerikanski rúmdarfelagsskapurin hevur almannakunngjørt, hvar tey kundu hugsað sær at farið næstu 10 árini. Amerikumenn kundu hugsa sær at vitja á gongustjørnuni Mars fyri at kanna, um lív nakrantíð hevur verið har. Harafturat droymir NASA um at sleppa til ein av mánunum hjá Jupiter. Um pengarnir verða til tað, skal ein ómannað rannsóknarferð gerast til mánan Europa fyri at kanna, um tað kanska er eitt hav á mánanum.



UMMÆLI: Inna Törnroos

## Krimidrotningin goes west!

Vælkendi svenski rithøvundin Liza Marklund og amerikanski starvsfelagin James Patterson hava í felag skrivað krimiskaldsøguna »The postcard killers« ella »Postkortmorderne«, ið danska heitið er.

Nógv hava verið ivingarsom um hesa bókina, tí tey hildu, at hon bara var ein roynd hjá bókaforlagnum at fáa Lizu Marklund inn á amerikanska bókamarknaðin.

Sjálv havi eg eisini verið ivingarsom um hesa bókina og tí tók tað langa tíð, áðrenn eg keypti mær hana, hóast at eg havi lisið alt, sum Liza hevur givið út áður.

Tað, ið eyðkennur bæði Lizu Marklund og James Patterson er, at bøkur teirra fara skjótt fram. Tað málsliga, ið Liza oftani verður kritiserað fyri, er einkult og lættlisið.

Bókin er um morð, ið verða framd um alt Evropa, og tá bókin byrjar eru drápsmennirnir komnir til Svøríkis. Ung pør verða dripin og blaðkvinnan Dessie og amerikanski politisturin Jacob Kanon seta sær fyri at finna tey ella teir, ið hava framt morðini.

Bókin er spennandi. Nógv av tí vanliga, sum oftani er at finna í bókunum hjá Lizu Marklund, er eisini við í hesari. Til dømis eru Dessie og Annika Bengtsson rættuliga líkar í atburði, tær eru báðar blaðkvinnur og báðar búsettar í Stockholm.

Amerikanski politisturin í bókini kemur inn til svensku starvsfelagarnar við »cut the crap« medferð. Eitt sindur slitið kann ein tykjast. Svensku politistarnir vita onki og eru bara forðingar á vegnum hjá Dessie og Jacob.

Mína bók keypti eg fyri 55 krónur, og eg eri glað fyri, at eg ikki havi goldið meira enn so fyri hana. Hon var okay lesnaður, men tær umleið 350 síðurnar eru skjótt lisnar, og aftaná situr ein við kensluni – ná, var hatta alt?!

